Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Djóni Nolsøe Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Sólvit E. Nolsø, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Nýtt barnaheim

Spurningar:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at halda fast í ætlanunum at byggja barnabústovnar og ikki barnaheim?
2. Hvørjar fakligar orsakir eru til at byggja barnabústovnar í staðin fyri eitt barnaheim?
3. Nær kann væntast, at tað verður bøtt um umstøðurnar hjá okkara mest sárbæru børnum?

Viðmerkingar:

Fyrrverandi landsstýrismaðurin hevur sagt, at ætlanin um at byggja eitt nýtt barnaheim er slept. Í staðin er ætlanin at byggja barnabústovnar, og sambært svari til fyrispurning á jólum 2020, so skuldu børnini fáa nýggj heim í apríl 2021. Vit eru nú farin inn í 2022, og einki er hent á økinum.

Talan er um sera sárbær børn, og týdningarmikið er at velja røttu bústaðarloysnina til tey. Tørvur er á einum stórum og sterkum námsfrøðiligum starvsfólkatoymi, sum arbeiðir tætt um hesa avbjóðandi og samansettu uppgávuna. Tað gongur ímóti øllum fakligum tilmælum at spjaða slíkt sernámsfrøðiligt arbeiði. Styrkin í at geva hesum børnunum bestu fakligu tænastuna er í einum sterkum og samstarvandi starvsfólkahópi, sum fær regluliga supervisión, reflekterar og sparrar.

Harumframt undraðist Barnaverndarstovan í samrøðu við Kringvarpið í desember 2020 á, at farið er frá ætlanini at byggja eitt barnaheim. Fyri at fáa greiðu á ætlanunum hjá nýggja landsstýrismanninum, verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 17. januar 2022

Djóni Nolsøe Joensen